# Fiskalikamið - skap og virki

## Tilfar

Hvítan bakka, pinnar, pinset, skalpel, saks, stereolup, sjóneyku, objektgløs og lineal.

## At vera varug við meðan vit skera fiskin sundur.

1. Hvussu sær fiskurin út niður eftir rygginum, legg dent á lit og mynstur um nakað er?

2. Hvussu sær fiskurin út niður eftir búkinum, legg dent á lit og mynstur?

3. Hvussu nógvir fjarðar eru og hvussu sær strikan út aftur eftir síðuni?

4. Lat munnin so nógv upp sum til ber, máta hvussu stórt gapið á fiskinum er!

5. Um fiskurin er livandi, royn og fá eina blóðroynd smurda á eitt objektglas tá ið fiskurin verður blóð gaður.

6. Tak allan fiskin ímillum hendurnar, og royn og lýs hvussu fiskurin er, er hann slímutur, hálur ella roslu tur ?

7. Sker niður í høvdið uppá tvørs, fyri at taka nytrurnar úr. Royn samstundis og fá heilan so heilskapaðan úr fiskinum sum til ber.

8. Hygg at táknunum, hvussu er liturin, hvussu nógvir táknubogar eru. Kryv fiskin frá táknuholinum og aftur ímíti gotinum. Royn at taka hjarta heilt úr.

9. Skil tað sum er í fiskinum varisliga sundur í livur, maga, garnar, skúvgarnar, gallbløðru og kynsgøgn.





**Set heiti á myndirnar!**

## Uppgávuspurningar

*Nýt tínar egnu eygleiðingar umframt google og bókina fiskar undir Føroyum í tínum svarum.*

1. Greið frá hjarta og blóðrensli hjá fiskinum.

2. Hvussu sær heilin út, ber til at samanbera fiskaheilan við okkara heila, hvussu ?

3. Hvussu síggja vøddarnir út. Hvat er orsøkin til litin á vøddunum heldur tú ? Hvussu svimja fiska.

4. Greið frá bygnaði og virki á sodningarleiðini hjá fiski.

5. Hvat er virki hja livrini ?

6. Hvussu loysir fiskur avbjóðingina við at sjógvur er nógv saltari enn hansara egna kropsvæta ?

7. Greið frá nøringini hjá upsa á landgrunninum ?

